FKF jour: 09_106

1. september 2010
Mál: 10/00196-35
Viðgjørt: Doris Bjarkhamar

Løgtingsmál nr. xxx/2010: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í lóg um almenna forsorg

§ 1

Í lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. marts 1988 om offentlig forsorg, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 179 frá 22. desember 2009, verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 32 a, verður orðað soleiðis:
"**§ 32 a.** Landsstýrismanninum verður heimilað at stovnseta skipanir, ið hava til endamáls at veita persónliga hjálp og røkt og stuðul til neyðugar praktiskar uppgávur í heiminum.
Stk. 2. Hjálpin kann veitast í styttri ella longri tíðarskeið vegna serligar umstøður so sum barnsburð, sjúku, eftirbata ella til at taka sær av brekaðum barni ella vaksnum í heiminum. Persónar kunnu eisini fáa hjálp í longri tíðarskeið, um hesi hava tørv á meiri støðugari hjálp.
Stk. 3. Landsstýrismaðurin ásetur reglur um:
a) Hvussu skipanin skal skipast og virka.
b) Útbúgving, setan og arbeiðsumstøður hjá starvsfólkunum.
c) Tað gjald, ið skal rindast fyri at fáa hjálp.

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Kap. 1. Almennar viðmerkingar
Verandi orðingin av § 32 a, stk. 4 er ógvuliga trong, at tað bert er, tá lóggáva er gjørd fyri tað einstaka røktarheimið ella økið, at til ber at sameina røktarheimsrakstur og heimahjálparaskipanina.

Mett verður, at tað er óheppið at áseta í lóggávu, hvar ávís starvsfólk kunnu virka, tí hetta eigur at vera grundað á onnur viðurskifti so sum fakligan førleika og avtalur við fakfeløg.

Orðingin forðar eisini fyri eini sameining av heimahjálp og røktarheimsrakstri, sum eitt nú hevur verið roynd í Sandoynni, og sum eisini virkar í dag í ávísum eldraøkjum.

Sambært eini eftirmeting, sum varð gjørd av skipanini á Sandoynni í 2002, er ein av fyrimununum við skipanini, at arbeiðið í størri mun kann skipast soleiðis, at starvsfólk verða flutt, har tørvur er á teimum. T.v.s. at røktartyngdin í økinum er avgerandi fyri, hvar starvsfólkið er.

Almannamálaráðið hevur eisini staðfest, at umsitingin av økinum longu hevur yvirhálað trongu skipanina, sum lógin leggur upp til. Í ávísum økjum er man farin undir líknandi skipan, og hetta við góðum royndum. Ynskiligt er at kunna gagnnýta henda møguleika í restini av landinum. Á tann hátt kann skipanin gerast meira smidlig og viðvirka til, at eldrarøktin kann skipast øðrvísi, enn trongu karmarnir í dag leggja upp til.

Uppskotið til broyting í forsorgarlógini er sostatt at strika forðingina fyri, at heimahjálparar kunnu arbeiða á ellisheimi. Lógarbroytingin í sjálvum sær hevur ikki við sær, at starvsfólk á sjálvsognarstovnum og hjá kommunum skulu flyta arbeiðsgevara.

Uppskotið var lagt fyri Løgtingið í seinastu tingsetu, men varð ikki liðugt viðgjørt. Landsstýriskvinnan hevur valt at leggja uppskotið framaftur.

Uppskotið hevur verið til ummælis hjá fylgjandi pørtum:

- Almannastovuni
- Nærverk
- Føroya Kommunufelagi
- Kommunusamskipan Føroya
- Stýrinum fyri Suðuroyar ellis- og røktarheimi
- Stýrinum fyri Norðoya ellis- og røktarheimi
- Stýrinum fyri Eysturoyar røktar- og ellisheimi
- Stýrinum fyri Røktar- og umlættingarheimi í Tórshavn
- Stýrinum fyri Røktar- og umlættingarheimi Lágagarð
- Stýrinum fyri Norðoya ellis- og vistarheimi
- Tórshavnar kommunu
- Heilsuhjálparafelag Føroya
- Almanna- og heilsurøktarafelagnum
- Felagnum føroysku sjúkrarøktarfrøðingar
- Ergoterapifelagnum
- Fysioterapifelag Føroya
- Landsfelag pensjónista

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304000 • Fax: +298 304045 • E-mail: amr@amr.fo

Kap. 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

Fíggjarligar avleiðingar
Uppskotið í sær sjálvum hevur ongar fíggjarligar avleiðingar. Broytingin kann viðføra eina meira smidliga skipan, sum ger tað møguligt at gagnnýta starvsfólkaorkuna betri og á tann hátt gera skipanina meira rasjonella.

Umsitingarligar avleiðingar
Uppskotið hevur í sær sjálvum ongar umsitingarligar avleiðingar, men givið er, at skal heimahjálparaskipanin broytast, krevst eitt ávíst fyrisitingarligt arbeiði í samband við umlegging av bygnaði, arbeiðsuppgávum, setanarviðurskiftum og starvslýsingum.

Avleiðingar fyri vinnuna
Uppskotið fær ongar avleiðingar fyri vinnuna.

Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið fær ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið fær avleiðingar fyri skipanina av eldrarøktini kring alt landið.

Sosialar avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Broytingin fær ávirkan á starvsviðurskiftini hjá ávísum fakbólkum bæði í Heimatænastuni og á røktarheimunum. Nevnast skal somuleiðis, at hóast uppskotið er gjørt við útgangsstøði í skipanini á Sandoynni, leggur uppskotið ikki upp til, at fólk á røktarheimum kring landið fara at varðveita sína pensjón, eins og tey gera á røktarheiminum á Sandoynni.

Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur.

Talva 1: Yvirlit yvir avleiðingar

	Fyri landið/ landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss/øki í landinum	Fyri ávísar samfelagsbólkar/ felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei

Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kap. 3. Serligar viðmerkingar

Til § 1
Heimild verður nú fyri, at heimahjálparar kunnu arbeiða úti í heimunum, á eldrasambýlum og á ellis- og røktarheimum, t.v.s. ásetingin um, at heimahjálparar bert kunnu arbeiða á røktarheimum, tá røktarheimsraksturin og heimarøktin verða sameind við lóg, verður strikað.

Til § 2
Gildiskomuregla.

Almannamálaráðið, 1. september 2010

Rósa Samuelsen
landsstýriskvinna

/ Eyðun Mohr Hansen